Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Vantandi savns-politikkur í høvuðsstaðnum

## *Oddagrein*

TAÐ er einki annað enn ein skomm, at Tórshavnar býur ikki hevur eitt býarsavn, sum vísir og lýsir søguna hjá høvuðsstaðnum við lutum, myndum og skjølum. Víst hava vit eitt heiti »Tórshavnar Býarsavn«, men savnið hevur ikki nøkur høli og onga fasta framsýning.

Í lýsingarblaðnum hjá Sosialinum við greinum um ólavsøkuna og nakað av tí, sum fer fram á ólavsøku var eisini eitt viðtal við Finn Johansen um býarsavnið. Finnur Johansen, sum er gamal býráðspolitikari í Havn, hevur verið sálin í býarsavninum og ein eggjandi kraft at varðveita nakað av tí gamla, siðsøguliga og søguliga í Havnini. Í hesum viðtali upplýsti hann, at Býarsavnið hevur ikki havt nakað høli síðani í kreppuárunum, tá leigumálið varð sagt upp.

MEN kreppan er farin aftur um og búskapurin stendur í fagrasta blóma. Tórshavnar kommuna fær nú so nógv inn í peningi, at hon hevur kunnað játtað pening til alskyns endamál. Eina millión til sjónleikarhús, eina millión til ríðihøll og hálva millión krónur til skótahús til dømis. Hetta er útmerkað fyri at skapa lív og trivnað, men er alt hetta lið í einum miðvísum mentapolitikki?

IKKI er greitt, um nakað er játtað til býarsavnið, og tað er kanska ikki nøkur kommunal skylda, men tá peningur verður latin til so mangt annað, so átti tað eisini at verið peningur til at leggja lunnar undir eitt veruligt býarsavn. Havnin hevur eina ríka søgu, og tí átti høvuðsstaðurin at havt eitt býarsavn og kanska eisini eitt sjósavn, tí tað er líka stór skomm, at føroyingar, sum ein siglandi tjóð, ikki hevur eitt sjó- og siglingarsavn.

BÝARSAVNIÐ hevur hesaferð eina framsýning við myndum, og tað hevur savnið havt áður, men tað kundi verið so mangt, sum eitt slíkt býarsavn kundi hýst, sum hevur meira lokalan áhuga enn tann annars frálíka framsýningin hjá Føroya Fornminnissavni. Hon hevur tikið so nógv fram, síðani hon fekk veruligar umstøður fyri nøkrum árum síðani.

Valár er í ár, men eitt býarsavn er ikki nóg gott agn aftur ímóti játtanum og stuðli til ávísar felagsskapir, sum býráðslimir kanska hava størri áhuga í, ella tilknýti til, men á hesum stað skal verða heitt á býráðið og áhugað um at virka fyri, at Tórshavnar býarsavn fær veruligar karmar fyri einum savni, sum lýsir søguna og virksemið í høvuðsstaðnum.

***Sosialurin***

## Minningarorð um
# Arnbjørn R. Thomsen

**f. 30. oktober 1949 d. 08. juli 2000**



Lítið veit ein um framtíðina, hetta mátti eg sanna tá ið eg fekk boðini um at Arnbjørn var deyður. Eg var tá stødd í Danmark.

Vit vóru øll í summarfrí á Blákrossheiminum, høvdu nýliga riggað av, Arnbjørn var saman við okkum, og sum altíð í góðum lag.

Hann var tann seinasti, sum var á vakt áðrenn farið varð í summarfrí. Vit høvdu gjørt av at møtast aftur tann 17. juli, men so skuldi ikki verða.

Eg havi kent Arnbjørn síðani 1984, frá 1988 hevur hann arbeitt á Blákrossheiminum. Arnbjørn var lættur at vera saman við, hevði so nógvar góðar eginleikar. Blíðlyntur, skemtingarsamur, reiðiligur, beinasamur, eitt ótrúligt menniskja. Hann var væl egnaðu rat vera í móttøkuni her á Blákrossheiminum, var tolin, gjørdi ikki mun á hvør ið kom inn. Hevði sjálvur kent trupulleikarnar á egnum kroppi, skammaðist ikki at siga, hvussu hann var komin burtur úr tí, og hvussu hann frøddist um tað edrúa lívið.

Honum dámdi sera væl mikukvøldsmøtini, var glaður um at vera saman við teimum, sum bóru Guds orð fram, og tá ið vit drukku kaffi aftaná, sat hann so blíður og prátaði við tey, av tí sama fekk hann ein stóran vinaskara.

Tey eru nógv, sum hava ringt ella tosað við meg um, hvussu hørm tey eru um, at Arnbjørn er deyður. Hann hevði sínar hugsjónir, og tað duldi hann ikki, hann segði sínar meiningar bæði í talu og á skrift, og alt við fullum navni undir.

Blákrossheimið hevur mist ein dyggan stuðul, vit hava mist ein góðan starvsfelaga, og eg persónliga hava mist ein góðan vinmann.

Men Tórhallur, Høgni, Sjúrður og Armgarð, tit hava mist mest, ein góðan pápa, sum altíð tosaði so vakurt um tykkum, eisini um tey, tit høvdu valt tykkum aftrat og ikki minst børnini. Hann livdi fyri tykkum, so tað er ein dyggur missur.

Harrin styrki tykkum í sorgini, eg ivist ikki í, at vit eru mong, sum syrgja saman við tykkum.

Við djúpum samkenslum vil eg lýsa frið yvir okkara góða vinmann, Arnbjørn R. Thomsen.

Blákrossheimið 22.07.00
**Sólborg Dulavík**

# Jassur í Føroyum

Í sambandi við endurútgávu á fløgu av „Jazz í Føroyum“ skipar Havnar Jazzfelag fyri konsert MIKUKVØLDIÐ 26/7 kl 21.00 í Gamla Meiarínum.

Tað var Havnar Jazzfelag, sum tá stóð fyri LP-útgávuni. Seinni gjørdist Tutl til felagið, sum tók sær av tónleikaútgávum - og eisini av hesum.

Havnar Jazzfelag var sera virkið frá miðskeiðis í 70-unum til 1983. Hyggur tú í skránna hjá „Jazztíðindi“ frá til dømis desember 1982, eru har 15 tiltøk: vitjandi úr Svøríki og Danmark, Gríma Kvøldseta, men serliga spældu fleiri føroyskir bólkar.

Á konsertina mikukvøldið er tann tá mest virkni bólkurin KRÆKLINGAR við: Ólavur Øster (gittar), Hans Petur í Brekkunum (saksofon), Kristian Blak (klaver), Kolbein Simonsen (bass) og Jónleif Jensen (trummur). Tey spæla „Nú liggur ein kavafonn“, „Cherry tree“, „Caramba“... Kræklingar hava eisini undirspælið, sum í „Jazz í Føroyum“-tíðini, hjá solistum: BRANDUR ØSSURSON (saksofon) fer at spæla „Fly me to the moon“, „Vem kan segla“ og „Blue Bossa“- og HANUS G. JOHANSEN (sangur) hevur „Pøstu verð“ á skránni, men eisini „The times they are a’changing“ og annað hjá Bob Dylan at framføra. Hanus fer haraftурat at syngja egna trubadurskrá.

PLÚMM: Leivur Thomsen (gittar), Magnus Johannesen (klaver), Finnur Hansen (ljómborð), Arnold Ludvik (bass) og Røgvi á Røgvu (trummur) - eru í løtuni øll í Føroyum úr Montreal, Keypmannahavn og Havn. Plúmmarnar eru so at siga 2. ættarlið av tónleikarum, sum spældu í Havnar Jazzfelag.

Á konsertini ber eisini til at gerast limur í Havnar Jazzfelag, ella endurnýggja limakortið. Grein 2. í lóg fyri Havnar Jazzfelag sigur: „Endamál felagsins er at fremja og nøra um áhugan fyri tónleiki, serliga jazz, folk og beat, og at fáa limum sínum eitt fjøllbroyt úrval av tónleiki.“ - So at sjálvt um konsertin mikukvøldið er afturskoðandi er ætlanin hjá felagnum at hugsa frammeftir.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**

## Tøkk

Vit siga hjartaliga takk fyri stóra samkenslu, ið varð víst okkum, tá kæra mamma okkara

**Anna Elisabeth Mørk Thomsen**

doyði og varð jarðað. Takk fyri kransar og blómur.

*Familjunnar vegna*

**Lars Brian og Ludvig**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, sum gleddu meg á 90 ára føðingardegnum. Takk fyri vitjanir, gávur, blómur, fjarrit og telefonsamrøður.

Túsund takk, øll somul.

**Jona Joensen**



# Bispur skal hava meiri vald

*Føroya bispur tekur lutvíst undir við danska hugskotinum um, at tað skal vera møguligt hjá bispunum at siga ómøguligum prestum úr starvi*



*Føroya bispur heldur tað vera rætt at geva bispum heimild til at siga prestum úr starvi. Men fyri at verða uppsagdur, skal presturin hava borið seg ógvuliga skeivt at*

JOHN JOHANNESSEN

Tað skal bera til at siga prestum, ið ikki samstarva við meinigheitina og aðrar prestar, úr starvi.

Hetta heldur rektarin fyri pastoralseminariið í Keypmannahavn, Mogens Lindhardt.

Føroya bispur, Hans Jacob Joensen, er lutvíst samdur í hesum áskoðanum. Seinastu tíðina hevur hann sjálvur havt nógvar trupulleikar av prestum, ið ikki vilja samstarva.

Men Hans Jacob Joensen heldur tó, at prestarnir skulu vera heilt ómøguligir, áðrenn bispur skal fáa heimild at heita á Kirkjumálaráðið, um at loysa teir úr starvi.

### Kirkjan skal ikki tømast

– Tað skal ikki bera til hjá prestum at vera so harðrendir, at teir prædika kirkjuna tóma, sigur Hans Jacob Joensen. Hann vísir á, at prestur ikki er settur til at rudda kirkjuna, men heldur tað øvugta.

Í Klaksvík hava kirkjufólk gramt seg um sóknarprestarnar, og eisini eru nøkur, sum alment hava sagt, at tey ikki fara í kirkju, tá Niels Pauli Danielsen ella Hans Eiler Hammer prædika.

Hendan trupulleikan er bispur greiður yvir. Men hann heldur kortini ikki, at dømið úr Klaksvík er so mikið ógvusligt, at tað kundi komið upp á tal, at bispur fór at taka álvarslig stig í hesum máli.

Hans Jacob Joensen hevur enn onga almenna kæru fingið frá kirkjufólki í Klaksvík um prestarnar har. Men kortini heldur bispur, at støðan í Klaksvík er so mikið álvarslig, at prestarnir eiga at taka í egnan barm, soleiðis, at teir ikki tøma kirkjuna.

– Tá ósemjur eru við kirkjufólkið og kirkjuráðið, eiga prestarnir sjálvir at taka stig til at binda um heilan fingur, ger bispur greitt.

### Ikki nóg mikið at vera ómøguligur

Hans Jacob Joensen heldur, at tað skal nógv til, áðrenn bispur skal fáa heimild til at siga prestunum úr starvi. Tað skal ikki bera til hjá bispi at siga einumm presti upp, tí hann klandrast við bisp. Hendan trupulleikan heldur Hans Jacob Joensen seg sjálvan eiga at stíðast við.

Men tekur so mikið álvarsligt stíð seg upp millum ein lokalan prest og meinigheitina, at vandi er fyri, at meinigheitin syndrast, heldur bispur, at kirkjuráðið eigur at hava heimild at heita á bisp, um at taka støðu í málinum.

Síðani skal tað vera upp til bisp, um hann heitir á Kirkjumálaráðið, um at siga prestinum úr starvi.

Allir prestar í danska ríkinum eru tænastumenn, og tískil vardir av tænastumannalógini. Tí mugu broytingar til, skulu bisparnir fáa heimild til, at siga teimum úr starvi.

# Hotellrúm kunnu seljast víðari við vinningi

*Hotellini kring landið hava nógv at gera á ólavsøku, men serliga í Havn eru hotellini yvirfylt, og tí ber eisini til hjá einum, sum hevur bílagt sær eitt rúm, at selja tað víðari við vinningi*

STEFAN Í SKORINI

Nógvir føroyingar hugsa í hesum døgum um, hvussu teir skulu búleikast í Havn á tjóðarhátíð okkara, meðan øll hotell og gistingarhús í høvuðsstaðnum eru fullsett.

Tí er væl møguligt hjá einum, sum hevur eitt kamar, at selja tað víðari uttan um hotellið. Av tí at so nógv eru um boðið at keypa eitt kamar, so verður prísurin væl hægri enn vanligt, og tí ber til at vinna eitt sindur av peningi uppá eitt hotellkamar.

Hotelleigarar siga, at hetta kenna teir einki til, og at teir ansa eisini væl eftir, at einki óregluligt fer fram millum gestirnar. Tó er møguleiki fyri at selja víðari, um tann, sum bílagt hevur, váttar, at ein annar fær kamarið. Hesir persónarnir kunnu so sínámilum avtala ein prís.

Annars hava hotellrúm verið at sæð til sølu, og hesi eru farin fyri hægri prís enn tann, sum hotellið ásetur.

### Nógv at gera allastaðni

Tey flestu hotellini runt landið hava eisini heilt fitt av bíleggingum á ólavsøku, men tó er heldur soltið við gestum í Suðuroynni.

Hotel Norð á Viðareiði, Hotel Eiði og Hotel Vágar hava øll mestsum fult hús á ólavsøku, og fleiri av gestunum eru føroyingar, sum ikki hava hug at fara á ólavsøku. Heilt fitt av útlendingum gista eisini á hotellunum uttan fyri miðstaðarøkið á ólavsøku.

Ofta hevur verið sagt, at havnafólk rýma út á bygd á ólavsøku fyri at sleppa undan hurlivasanum í Havn, men í Suðuroynni og í Klaksvík merkja tey einki til slíkt. Gestirnir eru sera fáir á Hotel Øravík og á Sjómansheiminum í Klaksvík.

# Løgmannsrøðan um at vera liðug

*Verður á síggja á internetinum, so skjótt sum løgmaður heldur hana ólavsøkudag*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Neistarnir rúka frá pennunum í Tinganesi í hesum døgum, nú seinasta hond verður løgd á løgmannsrøðuna, sum Anfinnur Kallsberg skal halda á Ólavsøku.

Samskiparin av hesum arbeiði er løgmannsstjórin Marjun Hanussardóttir.

- Løgmannsrøðan er í trimum pørtum. Fyrsti partur er tann sum løgmaður lesir upp í tinginum. Annar partur eru frágreiðingarnar frá teimum ymisku stýrunum og triði partur er eitt yvirlit yvir tær lógir, sum verða lagdar fyri tingið í komandi tingsetu, sigur Marjun Hanussardóttir, løgmannsstjóri.

Løgmannsrøðan er ein frágreiðing um virki landsstýrisins í farna ári og um ætlaninar í komandi ári. Tey ymisku stýrini hava freist til einaferð í juni at lata tilfar til røðuna. Áhugin fyri løgmannsrøðuni er ikki stórur aðrastaðni enn millum politikkarar og í fjølmiðlunum.

Løgmannsrøðan er í ár um 60 síður og hon verður løgd á heimasíðuna hjá landsstýrinum beinanvegin sum løgmaður fer á tingsins røðarapall ólavsøkudag.

**ÓLAVSØKAN:**

**Opið:**
**Ólavsøkuaftan kl. 9-19**
**Ólavsøkudag kl. 14-19**

**Tilboð**
Allar taskur 1/2 prís

**29**
Í Tróndargøtu
tel. 318200